



















# Eftirlønarskipan til føroysk virki

**Føroya Lívstrygging luttekur á vørumessuni 2004, við eini eftirlønarskipan til starvsfólk á føroyskum virkjum á privata arbeiðsmarknaðinum. Tað er Virkiseftirløn og byggir á skipanina við kapitaleftirløn**

VIRKISEFTIRLØN



*Fleiri føroysk virki hava Virkiseftirløn, ið tryggjar starvsfólkunum góða eftirløn, umframt trygging um illa vil til*

Keypiorkan hjá pensiónistum er ikki serliga stór, um tey bara hava almenna eftirløn at dúva uppá. Ov fá hugsa um lívið eftir arbeiðsárini. Skalt tú tryggja tær góð livikor, tá ið tú fert um pensjónsaldur, er neyðugt at hugsa seg um í góðari tíð. Eisini hóast ellisárini tykjast fjar, tá ið tú ert í bestu árum.

Ein eftirlønartrygging er eitt trygdarnet, sum skal geva tær eina trygga tilveru eftir eitt langt og virkið lív á arbeiðsmarknaðinum. Samstundis kann ein eftirlønartrygging verða ein fíggjarlig trygd fyri teg og tíni avvarðandi við deyða ella óarbeiðsføri áðrenn eftirlønaraldur.

Føroya Lívstrygging bjóðar eina Virkiseftirløn, sum veitir starvsfólkum á virkjum eina eftirlønarskipan, tá ið tey fara frá fyri aldur. Her er talan um øll starvsfólkini, bæði leiðslu og onnur starvsfólk.

## Trygg eftirløn

Virkiseftirlønin er ein kapitaleftirløn, sum verður útgoldin í einum, tá ið tú fert frá. Hon kann tó í fyrsta lagi útgjaldast við 60 ára aldur. Hon kann eisini leggjast um at verða útgoldin mánaðarliga.

Við deyða áðrenn eftirlønaraldur verður útgoldin ein upphædd, sum í minsta lagi er tann samansparda upphæddin, alt eftir hvør avtala er gjørd.

Verður tú óarbeiðsførur áðrenn eftirlønaraldur, verður tann valda veitingin útgoldin mánaðarliga eftir ávísum reglum.

Virkiseftirlønin er bæði ein trygg eftirløn til tín sjálvs, tá ið tú fert frá fyri aldur, og ein trygging fyri teg og tíni avvarðandi, um illa vil til. Tað ber eisini til at hava eftirlønarskipan uttan trygging við deyða ella óarbeiðsføri, og einans hava uppsparing til eftirløn.

## Valfríar veitingar

Virkiseftirløn gevur tær ávísar valmøguleikar at snikka tína egnu eftirløn saman. Tá ið hon verður teknað, velur tú, hvørjar veitingarnar skulu verða við óarbeiðsføri ella deyða. Alt eftir hvønn tú metir tørvin vera, velur tú hesar upphæddir.

Virkiseftirlønin kann eisini skipast við avmarkaðum valmøguleikum fyri hvørt einstakt starvsfólk á virkinum, t.d. um virkið velur at hava ein ávísan eftirlønarpolitikk.

## Skattafyrimunur

Umframt trygd, so er eftirlønin eisini ein háttur at fáa ein skattafyrimun.

Eftirlønargjaldið verður vanliga avtalað millum arbeiðsgevaran og starvsfólkið. Eftirlønargjøld liggja ofta millum 8 og 12 prosent av lønini, men kann verða meira, í mun til hvussu góð eftirlønin skal verða.

Tú sleppur undan at rinda skatt av peninginum nú, men tú rindar skatt sambært rentutryggingar-lógini, tá ið útgoldið verður.

Verður alt útgoldið í einum skal rindast eitt avgjald uppá 35 prosent. Mánaðargjøld verða skattað sum vanlig a-inntøka.

Vilt tú at vita meira um Virkiseftirløn, ert tú vælkomin hjá Føroya Lívstrygging, á bási 36 á Vørumessuni, ella ringja á telefon 221312, og fáa meira at vita um hvussu tú fær eina góða eftirløn.